# Sólskinssøga á Skála

**- Tað er ein fragd at síggja, at vit aftur eru farin undir skipasmíð í Føroyum og øll eru líka fegin um, at vit hava fingið póllendingar á Skála at sveisa, sigur stjórin á Skipasmiðjuni**

**SKIPASMÍÐ**

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Á skipasmiðjuni í Havn og á Skála, hava tey nógv jørn í eldinum. Og tað kann stjórin á skipasmiðjunum, Gunnar Mohr, ikki annað enn fegnast um. Serstakliga at vit nú aftur eru farin at smíða skip her á landi.

- Men einasta orsøkin til at tað ber til, at vit fingu eina serligu avtalu um at fáa handverkarar úr Póllandi higar at sveisa skrokkarnar.

Í løtuni eru teir í ferð við ein nýbygning til Thor og tá ið hann er liðugur, verður farin undir eitt skip afturat til Thor eftir sama leisti.

- At vit hava fingið póllendingarnar til Føroyar at sveisa skrokkarnar, eru ein sólskinssøga. Og eg tori at siga, at uttan undantak eru vit øll somul ómetaliga fegin um gongdina og um, hvussu væl tað gongst póllendingunum á Skála.

- Eg tori eisini at siga, at vit eru, øll sum ein, ógvuliga hugagóð at síggja, at vit aftur eru farin at smíða skip í Føroyum, sigur Gunnar Mohr.

## Ein fortreyt

Men samstundis ásannar hann, at fingu tey ikki hesa serligu avtaluna við pólsku sveisararnar, vórðu heldur ongi skip smíðað í Føroyum.

- Við ongum póllendingum, vóru heldur ongir nýbygningar, so einfalt er tað.

Hann sigur, at í fyrra lagi er kostnaðarstøðið í Føroyum ov høgt til, at tað letur seg gera at smíða skipaskrokkar í Føroyum á kappingarførum støði og tí misti skipasmiðjan ordrarnar.

- Og av tí, at vit mistu ordrarnar, er tað so langt síðani, at vit seinast smíðaðu skip í Føroyum, at førleikin her á landi at sveisa skrokkar, er eisini fokin.

- Nú er tað bara sjálv arbeiðslønin fyri at sveisa skrokkarnar, sum fer av landinum. Hinvegin skapar hetta nógv arbeiði í Føroyum og tí eru vit ógvuliga fegin um, at fakfeløgini sóu hendan møguleikan, sigur Gunnar Mohr.

Sjálvandi kunnu skrokkarnir smíðast uttanlands, men Gunnar Mohr sigur, at tað hevur stórar fyrimunir at smíða teir í Føroyum.

- Tað gevur teimum møguleika at hava eini nógv meiri flótandi arbeiðsgongd. Tá ið skrokkurin verður smíðaður í Føroyum, ber tað til hjá okkum at sleppa í holt við okkara part av arbeiðnum, so hvørt, sum skrokkurin verður smíðaður. Tað kann vera at leggja rør og kaðalar og at innrætta skipið ananrs.

Verður skrokkurin smíðaður uttanlands, sleppa vit ikki í gongd við okkara, fyrrenn skrokkurin er heilt liðugur og er komin til Føroya.

Og at smíða skrokkar uttanlands, elvir viðhvørt eisini til trupulleikar.

Í løtuni er skipasmiðjan í holt við ein trolara til Viðareiðis og tann skrokkurin varð smíðaður í Póllandi.

- Men hann var hálvan triðja mánað seinkaður og har stóðu vit so og fingu onki gjørt. Og tað leggur so eisini eyka trýst á skipasmiðjuna í Føroyum at fáa skipið liðugt til tíðina.

## Nógv virksemi

Annars arbeiðir skipasmiðjan alla tíðina fyri at útvega nýggjar sáttmálar og har eru ymsir møguleikar, sum Gunnar Mohr ikki fær sagt so nógv um.

Men Skipasmiðjan hevur eisini FJM í Runavík, har tey gera rustfríar framleiðslur til skip og virki og har er eisini nógv at gera.

- Í løtuni gera vit verksmiðju til nýggju bátarnar, sum Beta smíðar í Spania og vit gera eisini eina hummaralinju til ein trolara, sum verður smíðaður í Skotlandi og vit gera somuleiðis nýtt framleiðsludekk til Fuglberg.

Alt hetta kastar nógv arbeiði av sær og í løtuni eru eini 300-350 fólk í starvi hjá skipasmiðjunum og á FJM.

Og vónirnar fyri framtíðini eru ikki so galnar, tí tað verða nógv skip smíðað í hesum døgum og her hevur skipasmiðjan í Føroyum megnað at fingið sín part.

Hinvegin er tað ein avmarking, at tey kunnu ikki smíðað skip á Skála, sum eru breiðari enn 13 metrar.

Men á Skála er ætlanin er gera nýggja beding. Sum er, tekur bedingin skip upp til 800 tons, men tá ið nýggja bedningin er liðug í heyst, kunnu teir taka skip upp til 1500 tons og tað gevur møguleikar fyri at fáa fleiri skip til umvælingar.

Umvælingar er eisini eitt, tey hava nógv av og í løtuni eru nógv skip til umvælingar. Her er talan bæði um føroysk og útlendsk skip, eitt nú russisk skip.

Men tá ið Skipasmiðjan er umboðað á Fish Fair, er tað fyrst og fremst fyri at hitta fólk.

- Okkara viðskiftafólk vita, hvat vit standa fyri, so tað er avgjørt nummar eitt at sleppa at hitta fólk, sigur Gunnar Mohr.



*Á skipasmiðjuni hava tey nógv at gera og stjórin er fullur av lovorðum um avtaluna við fakfeløgini um at fáa pólskar handverkarar hendavegin at sveisa skrokkar*





System Sure II








Títt amboð til fult HACCP eftirlit

System Sure II er ein ATP-mátari uttan líka. Við honum er reingerðareftirlit eitt spæl. Lætt og ómakaleyst kann staðfestast, um lívrunnar restir eru á tildømis borðum og tólum – og tekur hetta einans 15 sekund.

Ring og hoyr nærri um reinførisloysnir okkara

Blika

Blika spf. · Akranesgøta 9 · Tórshavn · Telefon 35 6666
Telefax 35 6667 · T-post: blika@blika.fo · www.blika.fo

Sosialurin